Kongligu sjónleikararnir

Hesa vikuna vitja 5 av gitnu nøvnum frá kgl. teatrinum í Keypmannahavn okkum og føra teir fram 3 ymiskar sjónleikir, allir so stuttir, at teir væl kunnu leikast innanfyri vanliga sýningartíð, 2 1/2 til 3 tímar, men um somu tíð ógvuliga ymiskir, bæði í sniði og til innihalds. Tey, sum eru við í leikunum, munnu flest øll vera kend eisini her á landi — tey eru Poul Reichardt og Martin Hansen, sum føroyingar, ið siggja filmir vanliga, kenna væl; Frits Helmuth man helst ikki vera minni kendur, bæði frá filmi og frá vitjanum á teatrum í Keypmannahavn. Birgitte Price minnist onkur kanska ikki reiðiliga undir hesum eftirnavni, hon gekk áður undir navninum Birgitte Bruun, men hon er seinni gift við einum av frægastu donsku sjónleikarunum John Price, sum hesi seinni árini fremst hevur roynst sum ein av dúgligastu instruktørum á kgl. teatrinum; John Price hevur ikki bara instruerað leikirnar, sum teir nú føra fram, hann tekur eisini sum sjónleikari beinleiðis lut í einum teirra.

— — —

Sjónleikararnir komu higar í seinastu viku og fara aftur komandi sunnudag til Keypmannahavnar. Leikað hevur verið í Klakksvík fríggjadagin seinasta, leygardagin og sunnudagin í Havn, mánadagin á Glyvrum, týsdagin á Tvøroyri og í kvøld verður leikað í Vági. Í morgin verður leikað á Giljanesi og fríggjadagin í Vestmanna og seinasti leikurin verður so aftur í Sjónleikarahúsinum í Havn leygardagin.

Brævkassin

Brævkassin.
Tá ið eg havi hug at lesa ella læra til sosialráðgevara, loyvi eg mær at spyrja blaðið, hvar ein skal venda sær fyri at fáa nærri upplýsingar um hetta?
Við tøkk fyri upptøkuna.
Við tøkk fyri svarið.

Anna J.

SVAR: Í Danmark kann ein lesa til sosialráðgevara í Keypmannahavn og Århuus. Skúlaárið byrjar ávikavist 1. apríl og 1. oktober, og umsóknirnar skulu verða innsendar innan 15. des. og 15. juni.

Gjøllari upplýsingar fáast við t. d. at venda sær til *DEN SOCIALE SKOLE, Randersgade 10, København.*

Skulu tit brúka bil

persónkoyring ella skúlakoyring, so ringið tlf. 2773.

Alexander Dalfoss

2802

NAR-*vaskað*

centrifugerað og turkað

SNAR-*vask*

Bøgøta 14

12000 FØROYINGAR

lesa **SOSIALIN** tvær reisur um vikuna — eisini tær ódýru lýsingarnar. Ein lýsing í SOSIALINUM loysir sag. Veruleikan um føroyskan politikk í løtuni fært tú best í SOSIALINUM.

Veitst tú

AT maðurin, sum grundaði New York bar navnið Peter Minuit. Hann keypti oynna Manhatten frá indianarunum fyri 60 hollendskar gyllin fyri 300 árum síðan.

AT australskir serfrøðingar siga frá, at húsfrúgvin í meðal gongur 18.000 fótafet um dagin — harav 13.000 fet í køkinum.

AT hin fyrsti spegilin úr glasi varð gjørdur í Venesia Í Italia í seinra helmingi av 17. øld.

AT orðið »hurra« kemur frá kosakkarunum, sum róprtu »hu raj«, sum merkir paradis.

AT í nógvum japanskum skúlum mugu børnini læra at skriva við báðum hondum.

Tá ið fólk ikki hava ringa samvitsku, er tað tí at tey onga hava.

—o—

UNGI Janus hitti ein dagin ein av sínum gomlu skúlakammiratum, sum hann ikki hevði sæð í áravís.

Janus: Hvat gert tú Petur, hevur tú nakað starv?

Petur: Jú, eg arbeiði á skrivstovuni hjá pápa. Og tú, hvat gert tú?

Janus: Nei, eg geri heldur einki.

—o—

TAÐ eru bara tey fáu, ið kunnu liva av tí lønini, tey fáa; tí liva tey av tí lønini, tey vænta sær.

SALTFISKAPRÍSIR

Prísásetingarnevndin á saltfiski hevur á fundi 5. juni 1964 ásett hesar landingarprísir á saltfiski.

Toskur yvir 12'	nr. 1 stp.	108-0-0	fyri tonsið
« « 12'	nr. 2 stp.	100-0-0	« «
allar støddir	nr. 3 stp.	62-0-0	« «

Tó um meira enn 10 pst. av eini fiskalast er av støddini 12—16', skal nøgdin, sum er yvir 10 pst. gjaldast við stp. 66-0-0 fyri tonsið, nr. 1 og 2 samfingið.

Hesir prísir eru treytaðir av, at vektin stendur **á bryggju við skipssíðuna**, og eru prísirnir galdandi frá og við 5. juni 1964.

NEVNDIN

Kongligu sjónleikararnir

hava

Matiné

upplestur, sangur, musikkur

leygardagin kl. 16 á Sjónleikarhúsinum.

Atgongupeningurin a 10 kr. fer til nýggju Sjónleikarhús bygginga í Tórshavn.

Sama dag kl. 20

SEINASTA FRAMFØRSLA

av sjónleikunum NEI, REJSEN TIL DE GRØNNE SKYGGER og KIVFUGLEN.

Atgongumerki til Matinéina kunnu bileggjast í Sjónleikarhúsinum **(telf. 1131)** hósdag og fríggjadag **kl. 15—16** og leygardag **kl. 12—14**. Atgongumerki til sjónleiksýnina **(a 5 kr.)** kunnu bileggjast somu tíðir.

KUNSTGØDNING

Nyt lager er hjemkommet af:

superfosfat gran. 7,8% P
kali-superfosfat 1:2
kaligødning, gran. 49% K
Nitrophoska
Hoechst

Største lager — Billigste priser

Pf. Valdemar Lützen

Telefon 1020 — 3 linjer

Licitation nr. 12

Landssjúkrahúsið, Dronning Alexandrines Hospital, byggeudvalget, udbyder herved **glarmesterarbejdet** på den nye patient- og behandlingsbygning i offentlig licitation uden byggherreerklæring.

Udbudsmaterialet kan, så længe oplag haves, fra lørdag, den 6. juni d. å. kl. 10,00 udleveres fra

1. hospitalets kontor, Thorshavn
2. arkitekterne Carlo Odgård & Ole Odgård & Aaby Sørensens tegnestue, Vesterbro 62, Aalborg.

mod depositum i form af noteret og crossed check på kr. 200,00 stilet til hospitalets byggeudvalg, Thorshavn.

Tilbudet afleveres i lukket kuvert tydeligt mærket »Licitation nr. 12« og tilbudsgiverens navn og adresse senest ved licitationens afholdelse lørdag, den 27. juni 1964 kl. 10,30 på hospitalets kontor i Thorshavn.

Alt udleveret licitationsmateriale returneres til det sted, hvorfra det er udleveret senest en uge efter licitationen, hvorefter det stillede depositum tilbagesendes, såfremt det tilbageleverede materiale er i ubeskadiget stand.

IRIS

Heitur matur — Smurt breyð

Tryggingarsambandið FØROYAR

Føroya Kríggstrygging	Tlf.	1090
Føroya Sjóvátrygging	-	1090
Føroya Brunatrygging	-	1098
Føroya Vanlukkutrygging	-	1721

Vit tryggja:

Bátar, skip, vørur, hús, innbúgv, akfør o. a.

Føroyingar eiga at tryggja í landsins egnu trygging.

NORÐOYA SPARIKASSI

tlf. 5043 **stovnaður 1919** **tlf. 5043**

Sparikassin er opin kl. 10—12 og 14—16, leygardag 10—12½.

Lán verða givin móti veð í jørð og bygningum.

Renta av innskoti er 3½ % p. a. og av innskoti uppá uppsøgn 4 % p. a.

Innlánsrentur:

Kekk-konto	2 %
Bankabók	3½%
Innlán, 3 mðr.	4 %

Fyri størri upphæddir kann seravtala verða gjørd um hægri renting við longri uppsøgn.

FØROYA BANKI